

hjá honum fær krabbamein. Tað er ikki stuttligt, at hon hevur fingið krabbamein, men vit gera gjøldur burtur úr reaktiónini hjá Frank. Vit hava eisini fingið rós frá fleiri, at loysa eitt sindur upp í álvarsama prátinum um deyðiligar sjúkur. Tað er Frank, sum er klovnurin, og tað er honum, vit flenna at. Eg havi ongan sum helst boðskap í mínum skemti. Onnur hava ofta hug at fortelja fólki, hvat er rætt og skeivt. Soleiðis eri eg als ikki. Eg vil vísa øðrum, hvussu eg livi, og um tey vilja, so kunnu onnur flenna at tí. Tað vóni eg, at fólk skilja. Men dámar teimum ikki okkara skemt, so vil eg fegin biðja um umbering, og biðja tey sløkkja sjónvarpið, sigur Frank Hvam álvarsamur á málinum.

*Hvussu koma tit fram á hendingarnar, sum vit síggja aftur í Klovn?*

Eg og Casper Christensen hava altíð ein lítlan skriviblokk við okkum, har vit eru í gerandisdegnum. Og er tað eitthvørt, sum undirheldur okkum, so skriva vit tað niður. Síðani seta vit hesar hendingarnar, og aðrar úr okkara veruliga lívi, saman. Tað er í grundini soleiðis, vit gera, greiðir Frank Hvam frá.

## Einsligt sum djóralækni

Frank Hvam vaks upp í bygdarlívinum í Ørum Sønderlyng í Jyllandi, har foreldrini høvdu bóndagarð. Umhvørvið gav lítla kúllinum áhuga fyri djórum, og stóru áhugamálini sum yngri vóru at sópa, fletta og koyra traktor.

Bygdardrongurin stórtreivst í øllum rokinum, og rættiliga tíðliga gjørdi hann av, hvat hann skuldi verða. Djóralækni.

*Hvussu kann ein djóralækni enda sum ein av fremstu skemtarunum í Danmark?*

– Eg havi altíð verið ótrúliga góður við djór, men í longdini kundi tað verðið ov einsligt. Tað er ikki akkurát eg at búgva í eini kjallaraíbúð við einu kettu, sum eitur Sofus. Ikki tí, fleiri stórtrívast soleiðis, og tað er einki galið við tí, men soleiðis eri eg ikki. Mær dámar væl nýggjar avbjóðingar, og tað er teimum, eg leiti eftir allatíðina. Og so elski eg at fáa fólk at flenna, sigur Fram Hvam í horninum úr Keypmannahavn.

Yrkisleiðin sum skemtari byrjaði í 1995, tá hann royndi seg við stand-up á Café Din's í Keypmannahavn. Tá gavst hann somuleiðis at lesa til djóralækna, sum hann hevði fingist við seinastu trý árini. Gjøgnumbrotið kom ikki av álvara fyrr enn í 1999, tá hann átti leiklut í sendingini hjá vinmanninum Casper Christensen í »Casper og Mandrilaftalen«. Seinni var hann ein av høvuðspersónunum aftan fyri sendirøðina »Langt fra Las Vegas«.

– Eg angri einki í dag. Eg trúgvi í grundini ikki upp á nakað, og havi ongantíð hugsað ov langt fram í tíðina. Eg tumli ígjøgnum lívið og taki alt, sum tað kemur. Eg hugsi ikki um at taka eina avgerð, sum kemur mær til góðar í framtíðini. Tað skal verða beint nú. Fyri 13 árum síðan varð eg lokkaður at royna meg sum skemtara, og tað eri eg fegin um í dag. Men tað er ikki soleiðis, at eg havi mist áhugan fyri djórum. Eg brúki framvegis fleiri tímar framman fyri sjónvarpsskígganum og hyggi at Animal Planet, sigur Frank Hvam, og flennir.

## Ætlar sær til Føroya

Ein nýggj røð av Klovn-sendingum verður send í danska sjónvarpinum í vár. Men tað verður eisini tann seinasta – á hesum sinni, í øllum førum. Frank Hvam og Casper Christensen fara nú hvør til sítt, har teir fara at royna seg við sínum egna stand-up. Og møguleiki er eisini fyri, at vit fáa Frank Hvam at síggja á føroyskum palli.

– Tá eg frætti um áhugan fyri Klovn í Føroyum, gjørdist eg rættiliga bilsin. Eg var als ikki vitandi um, at føroyingar hugdu at tí. Men eg eri hjartans fegin, tí tú fært eitt kick til at halda fram. Og nú hugsi eg um møguleikan at vitja tykkum við mínum showi, sigur Frank Hvam, sum ikki hevur stórvegis kunnleika um Føroyar.

– Eg havi ongantíð verið har, men tað verður eingin trupulleiki. Mítt umhvørvi sum yngri hevur lært meg, at eg kann liva einsamallur í einum fuglabergi uttan at sakna nakran. Men eg havi frætt, at eg skal vera heppin. Tí, sum eg skilji, so dettur annað hvørt flogfar niður í Føroyum, ella okkurt slíkt? sigur 38 ára gamli Frank Hvam, áðrenn hann flennir í kíki.

– Nei, tvætl. Ætlanin er so at koma til Føroya, sigur danski bygdardrongurin, sum í dag er ein hin fremsti skemtarin í Danmark.

***Stórskemtarin, Frank Hvam Nielsen, umhugsar at koma til Føroya við sínum showi***

## Fakta

**Frank Hvam Nielsen**

Skemtari, sjónleikari og tekstahøvundur

Føddur 12. september 1970, og uppvaksin í Ørum Sønderlyng við Viborg

Byrjaði at lesa til djóralækna í 1992, men gavst á triðja ári

Byrjaði yrkisleiðina sum stand-up-skemtari á Café Din's í 1995

Fekk sítt avgjørda gjøgnumbrot í »Casper og Mandrilaftalen« í 1999

Saman við Casper Christensen skrivaði hann »Langt fra Las Vegas« og »Klovn«

Er farin at fyrireika egnar stand-up sýningar, sum væntandi byrja í vár